Kunngerðablaðið A
2024
Givið út 21. juni 2024

Nr. 72

18. juni 2024

**Kunngerð**
**um**
**stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum**

Við heimild í § 10, stk. 2 í løgtingslóg nr. 78 frá 1. juni 2023 um bókasøvn (Bókasavnslógin) verður ásett:

**§ 1.** Stuðul verður veittur kommunum til menning av fólkabókasavnstænastum.

**§ 2.** Landsstýrisfólkið fráboðar kommununum í seinasta lagi 31. mars á hvørjum ári, hvussu ætlanin er at býta játtanina, ið eftir ætlan verður sett av til stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum, fyri komandi árið, sbr. tó § 4, stk. 2.

*Stk. 2.* Stuðulin kann verða latin til bókakeyp og talgildar tænastur, ella til skipan av samstarvi millum kommunur um fólkabókasavnstænastur, sbr. stk. 3.

*Stk. 3.* Stuðul til skipan av samstarvi millum kommunur um fólkabókasavnstænastur verður bert latin eftir avtalu við kommunur, ið hava fólkabókasøvn við starvsfólki við hægri bókasavnsfakligari útbúgving ella bókavarðaútbúgving í starvi.

**§ 3.** Landsbókasavnið umsitur stuðulin til menning av fólkabókasavnstænastum.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* Stuðul til menning av fólkabókasavnstænastum fyri 2024 verður fráboðaður í seinasta lagi 1. september 2024.

Almanna- og mentamálaráðið, 18. juni 2024

**Sirið Stenberg (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)